Tí›indaskriv frá Bókadeild Føroya Lærarafelags

Meiri er millum himmal og jør›

Edward Fuglø hevur myndpr‡tt bókina

Erling Poulsen hevur savna› frásagnirnar og Edward Fuglø hevur myndpr‡tt bókina og gjørt permumyndina. Anna Brimnes skipa›i søgurnar.

Í 1995 gav Bókadeild Føroya Lærarafelags út bókina »Mangt er millum himmal og jør›«, sum teir bá›ir systkinabørnini, Torkil Beder og Erling Poulsen, høvdu skriva›. Bókin fekk avbera gó›a móttøku, og skjótt var› avrátt at geva út eina bók afturat, tí tá i› fólk høvdu lisi› fyrru bókina, vendu fleiri sær til høvundarnar vi› n‡ggjum søgum.

Erling helt so áfram at savna frásagnir av sama slag, sum tær, i› eru í »Mangt er millum himmal og jør›«, og ta› eru so hesar søgur, i› nú ver›a givnar út vi› heitinum: »Meira er millum himmal og jør›«. Erling gjørdist einsamallur um hetta savningararbei›i›, tí heilsan hjá Torkili bila›i so miki›, at hann fekk ikki veri› vi›, men hann eigur kortini nakrar av frásagnunum.

Frásøgurnar í hesari bókini snúgva seg m.a. um fyribo›an og ávaring, ófrættatí›indi, feigdarbo›, at vera sanndroymdur, dulda megi, i› rættir hjálpandi hond, at vera framsíggin, dey›, i› ganga aftur, og huldufólk.

Aftur at Erlingi sjálvum fáa frásøgufólk úr øllum Føroyum or›i›. Nevnast kunnu m.o.: Árni Jacobsen í Havn, Arne Vatnhamar í Leirvík, Óla Groth í Dali, Anna Sofía í Vági (Klaksvík), Jógvan Jallur Højgaard í Havn, Palli í Tø›uni í Vági, Torkil Beder, Edvard í Skor›ini Joensen, Andrea Løwe Jacobsen í Klaksvík, Súni Jacobsen í Havn og Albert á Høggeil í Sumba.

Ta› vóru tey, i› funnust at fyrru útgávuni, tí ikki var prenta›, hvør hev›i sagt søgurnar, og eisini var› dult, hvørjar persónar søgurnar vóru um. Hetta komst mest av tí, at fleiri frásøgufólk løgdu eina vi›, at tey vildu vera ónevnd. Í hesar bókini er ø›rvísi: Her ver›ur í flestu førum sagt, hvør er heimildarfólk og eisini, hvønn søgan sn‡r seg um. Tær fer›irnar, heimildarfólk og høvu›spersónar eru ónevndir, er tí,at høvundanum var› álagt at nevna nøvn – ella, í einstøkum førum, tí at hann ikki visti ella mintist, hva›ani søgan stava›i.

»Meira er millum himmal og jør›« er 208 bls., innbundin og kostar kr. 250 í bókabú›unum. Bókin er umbrotin og prenta› á Hestprent.

Tí›indaskriv: Barnakonsert í Ítróttarhøllini í Runavík

»Jesus - besti vinur barnanna«

Ein kann ikki siga anna› enn, at fólk í Eysturoynni eru sera virksom, tái› ta› kemur til at skipa fyri andaligum tiltøkum, tí aftur nú er okkurt spennandi á skránni.

Fyrr í ár var eitt stórt tiltak samskipa á Svangaskar›i fyri børnum úr øllum landinum, og komandi sunnudag, 26. november, sleppa børnini aftur framat, tí tá ver›ur stór barnakonsert í ítróttarhøllini í Runavík, undir heitinum: Jesus - besti vinur barnanna. Konsertin byrjar kl.15.00.

Ein av stigtakarunum, Anita Tausen á Toftum, sigur, at endamáli› vi› konsertini er at savna børnini, saman vi› foreldrum sínum, til eina hugnaliga sangløtu, har bo›skapurin um barnavinin besta ver›ur bo›a›ur bæ›i í sangi og talu. Tiltaki› er ikki einans fyri børn í Eysturoynni, tí plakatir eru settar upp bæ›i í Havn og í Klaksvík, og a›rasta›ni vi›, so meiningin er, at børn allasta›ni frá, skula fáa høvi at uppliva konsertina - eitt framtak, sum ikki er hvønn dags kostur, tí nógv ver›ur gjørt burtur úr til tess, at løtan skal ver›a ein gevandi og minnirík løta, bæ›i fyri børn og foreldur.

Skráin ver›ur fjølbroytt, og hartil spennandi, vi› luttøku av bæ›i barnakórum og ungdómskórum frá ymiskum samkomum. Barnakóri› í missiónshúsinum á Strondum, sum er ikki færri enn 40 børn, ver›ur vi›, og eisini ver›ur barna- og ungdómskóri› í Nebo á Toftum; somulei›is ungdómsbólkurin í missiónshúsinum á Glyvrum.

Eisini koma tær bá›ar, 13 ára gamla Gu›run Háberg úr Havn, og 8 ára gamla Gunnri› á Lakjuni úr Fuglafir›i at luttaka vi› solosangi.

Men vit fara ikki einans at lurta, vit fara eisini at syngja sjálvi, tí ætlanin er, at ta› eisini skal ver›a nógvur felagssangur vi› kendum kórum og sunnudagsskúlasangum. Ta› ver›a tey bæ›i, Randi og Símun Hansen, sum fara at lei›a felagssangin, og av royndum vita vit, at Randi og Símun duga væl at lei›a sang, so vit fara øll, uttan iva, at hava eitt satt sangupplivilsi henda sunnudagin í ítróttarhøllini í Runavík, og tí fara vit at heita á tykkum øll, børn og foreldur, um at vera vi› og ikki missa hetta gó›a høvi.

Eina løtu sum hesa er rúm fyri bæ›i álvara og skemti, og tí ver›ur okkurt stuttligt eisini á skránni: Absalon Áargar› ver›ur vi›, og saman vi› honum ver›a teir stuttligu dukkudreingirnir, sum jú eru óførir at undirhalda. Eisini ver›ur klovnurin Nøfflè, og moppedukkurnar ver›a eisini at síggja og hoyra.

Til tess at grei›a tær nógvu útrei›slurnar í samband vi› eina tílíka konsert, so er eitt ávist atgongugjald sett: Vaksin 50,00 kr. og børn 25,00 kr. Atgongumerkir eru at fáa í flestu bensinsølum og í kunningarstovuni í Havn, har eisini er møguligt hjá fólki at bíleggja.

Kristiligi bókhandilin í Saltangará, Vitin, kemur at hava ein sølubás vi› barnabókum, fløgum, bondum og anna› til børn. Sum eitt minni frá konsertini, ver›ur eisini møguleiki hjá børnunum at keypa sær eina T-shirt vi› áskriftini: JESUS - BESTI VINUR BARNANNA.

Konsertin ver›ur annars l‡st nærri bæ›i í blø›unum, í innanoyggja og í útvarp Føroya, Rás 2 og í Lindini.

Vit ynskja fyrireikarum og øllum luttakarunum eina gó›a konsert, og vóna at høllin ver›ur á tremur.

Tí›indaskriv:

N‡ggjur álmanakki

Aftur í ár ber føroyski álmanakkin hjá H. N. Jacobsens bókahandli bo›um, at ári› er fari› at halla, og at eitt n‡tt ár er á veg. Í Álmanakkanum 2001 er sum vant nógv at finna um n‡ggja ári›. Umframt vælkenda innihaldi›, sum líkasum hoyrir til Álmanakkan, er ymiskt n‡tt komi› afturat, eins og Álmanakkin í ár hevur fingi› eitt meira tí›arhóskandi sni›.

Størsta broytingin er, at Álmanakkin í ár er í litum. Harafturat er innihaldi› skipa› í 7 partar, vi› hvør sínari yvirskrift, so ta› gerst lættari at finna ta›, ein leitar eftir.

Fleiri kort og myndir eru nú í Álmanakkanum. Vestfalskyrrindi eru aftur í ár rokna› út á sama hátt, sum tey hava veri› í mannaminni, men hesufer› eru bæ›i streymkurvar og streymkort komin afturat at l‡sa streymvi›urskiftini á føroysku fir›unum.

Sum naka› n‡tt hava ali- og oljuvinnan fingi› innivist í Álmanakkanum. Á einum korti sæst, hvar ymsu smolt- og alistø›irnar eru, og á einum ø›rum er yvirlit yvir oljuloyvini í føroyskum øki. Hol er eisini sett á, at fáa yvirlit yvir allar havnirnar í Føroyum vi› bæ›i mynd og korti, sum vísa hvussu havnirnar síggja út.

Føroyski álmanakkin fæst í ár bæ›i innbundin og heftur. Innbundin kostar Álmanakkin 2001 175 krónur, me›an vælkenda hefta útgávan fæst fyri einans 125 krónur.



ítróttur
Nr. 225 • mikudagur • 22. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Rúni givi› avbo › til landsli›i›

Strikuspælarin hjá Kyndli sær seg ikki hava møguleika fyri at n‡ta ney›ugu tí›ina til landsl›i›, og hevur tí givi› landsli›svenjaranum avbo ›

HONDBÓLTS-LANDSLI‹
Jákup Mørk

Sum nevnt í bla›num í gjár, so eru fyrireikingarnar hjá A-landsli›num í manshondbólti um at koma rættiliga í gongd, nú tríggjar spennandi uppgávur liggja fyri framman.

Í samrø›u vi› landsli›svenjaran ásanna›i hesin, at ta› liggur eitt sera strævi› tí›arskei› fyri framman hjá leikarunum, og at okkurt avbo› tí eisini kundi vera náttúrligt.

Tá var hann kunna›ur um, at í øllum førum Jónleif Sólsker og Annfinn N. Debess úr ávíkavist Kyndli og H71 høvdu givi› avbo›, tí teir ikki kundu ofra ney›ugu tí›ina til hetta, og nú er so eitt avbo› komi› afturat.

Arbei›i og skúla framum

Ta› er Rúni Poulsen, sum er annar av strikuspælarunum hjá Kyndli á landsli›num, sum nú hevur givi› venjaranum tungu bo›ini.

Orsøkin er púra einføld. Nevnliga at hann ikki sær sæsr nakran møguleika at vera vi› á landsli›ssavningunum.

– Vit fingu yvirliti› yvir venjingarnar fyri viku sí›ani, og sí›ani havi eg so tugt eitt sindur uppá, um eg skuldi geva avbo› ella ikki, sigur Rúni.

Talan er jú um spennandi uppgávur, men hetta krevur eisini, at vit fram til 21. januar venja í mi›al annan hvønn dag vi› landsli›num. Harafturat skulu vit eisini venja vi› feløgum okkara. Hann leggur afturat, at tá hann samstundis skal røkja arbei›i og skúlagongd, so hevur hann valt at takka fyri seg í fyrsta umfari.

Tunt á strikuni

Einki er at taka seg aftur í, at júst strikuspælarar er naka›, sum landsli›svenjarin hevur stóran tørv á í løtuni. Til dystirnar móti Grønlandi í vár vóru tríggir strikuspælarar vi› í hópinum, men av hesum er nú bert kyndilsleikarin, Janus Einar Sørensen, eftir. Umframt Rúna Poulsen var tá eisini talan um Bár› Brimvík úr H71, men hesin er í løtuni úti vi› drúgvum ska›a.

Klamsa› vi› hur›unum hevur Rúni tó á ongan hátt, og hann sigur eisini, at fyri sítt vi›komandi gloppar landsli›shur›in framvegis. Eisini tí at mangulin upp á strikuspælarar tykist somiki› akuttur.

– Eg seg›i vi› Palla, at um hann var opin fyri tí, so kann eg framvegis vera tøkur til landsli›suppgávurnar, men um so er, má hetta vera undir ø›rum treytum enn teimum, sum nú eru galdandi, sigur Rúni Poulsen at enda.

Rúni Poulsen sær seg ikki føran fyri at røkja bæ›i arbei›i og skúlagongd, um hann samstundis skal spæla vi› bæ›i Kyndli og landsli›inum

Botnurin gerst alsamt tættari

Tveir dystir ver› a leiktir í bestu mansdeildini í kvøld, og úrsliti› kann ver› a, at Neistin ver›ur meira trongt í botninum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir upprunaligu kappingarskipanini var bert talan um tann eina dyst mikukvøldi›, men sí›ani eru so nakrar flytingar av dystum farnar fram. Hesar flytingar ver›a prenta›ar á hesum sí›um í bla›num í dag.

Tann dysturin, sum eftir upprunaligu skránni skuldi leikast, er botndysturin ímillum KÍF og Tjaldur.

Á pappírinum tykist hetta at kunna gerast ein sera spennandi dystur, og í øllum førum kann sta›festast, at bæ›i li›ini so avgjørt hava naka› at strí›ast fyri. Bert eitt stig skilir partarnar, men umframt sjálvan dystin um at sleppa frá aftasta plássinum, kann vinnandi li›i› eisini toga seg nærri Neistanum og H71, sum eru á plássunum beint omanfyri.

Av hesum skal Neistin eisini í dyst mikukvøldi›, og skal metast eftir úrtøkuni seinastu dystirnar, so røkist líti› fyri, at havnarmenninir fáa stig vi› sær burtur úr tí dystinum.

Fyrra dystin millum li›ini bæ›i vann VÍF heili 40-21, og undirstrika›u teir samstundis, at styrkislutfalli› í deildini er broytt sí›ani í vár.

Samstundis var dysturin vi› til at seta gongd á krepputosi›, sum hevur veri› um Neistan seinastu vikurnar. Eitt er, at li›i› ikki er eins væl fyri, sum í vár, men vi›hakdsfólk felagsins munnu illa kunna gó›taka, at felagi› ert hálvt ár eftir FM-heiti› skal strí›ast fyri at sleppa úr botninum á stigatalvuni.

Bá›ir dystirnir ver›a leiktir kl. 19.45

Neistin hevur veri› í einum aldudali seinastu umførini, og torført ver›ur at koma úr hesum, tá VÍF er mótstø›uli›i›